# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Jógvan við Keldu 60 ár



30. januar fyllir góði vinmaður mín, Jógvan við Keldu, seksti ár. Vit hava kenst frá heilt ungum av og komu eisini at arbeiða saman á skrivstovuni hjá Pf J. F. Kjølbro í nøkur ár. Hann sló seg tó ikki til tols við at halda áfram við bert at arbeiða fyri onnur, men stílaði eftir at fara undir egið virki ella fyritøku. Hetta fór hann eisini undir á ungum aldri við góðum móti og stórum hegni og áræði og byrjaði við at umboða fleiri útlendskar fyritøkur, sum millum annað seldu skrivstovu- og handilsinnbúgv. Væl varð hann móttikin kring oyggjarnar, og vørurnar vórðu vælumtóktar. Seinni fór hann so eisini undir heilsøluvirksemi við matvørum og kolonialvørum og hevði í mong ár fleiri fólk í arbeiði. Eitt skifti seldi hann eisini bæði persónbilar og lastbilar.

Saman við øðrum framtakshugaðum monnum í Klaksvík var hann eisini við til at fyrireika og fremja tær fyrstu sølustevnurnar her í býnum. So sigast kann, at hann hevur lognu frá ungum av verið virkin og havt slóðbrótandi evnir og hevur gingið á odda við at royna nakað nýtt, býi okkara, landi og fólki at gagni. Kommunalpolitikkur og landspolitikkur hevur eisini frá ungum av havt hansara stóra áhuga, og hevur hann sitið í býráðnum í fimm setur tilsamans. 16 ár hevur hann verið borgarstjóri okkara, og eg haldi ikki, at eg taki ov dýran til, tá eg sigi, at hann uttan iva man vera tann borgarstjóri, sum hevur megnað at umboða bý okkara eina best bæði innanlands eins væl og uttanlands. Og ikki at gloyma, at tað var hann, sum fyri 20 árum síðani kom við hesum slóðbrótandi hugskotinum at gera undirsjóvartunnil um Leirvíksfjørð. Hesa ætlan helt hann eisini fast við, sjálvt um mong róku hann á spott fyri hetta "øra projektið", sum tikið varð til. Tvey valskeið hevur hann sitið á Føroya Løgtingi og umboðað Fólkaflokkin, har hann hevur verið ein litríkur politikari.

Innan mentanarlívið og tónleikalívið hevur hann eisini gingið á odda, og saman við øðrum góðum kreftum fekk hann sett á stovn Klaksvíkar Musikkskúla, sum hevur havt ein ómetaliga stóran týdning og uppalt eina mongd av tónleikarum upp ígjøgnum tíðirnar.

Innan samkomuna í Betesda, ið hevur verið andaliga heim hansara frá barnsbeini av, hevur hann ígjøgnum fimti ár havt ein sera týðandi og virknan leiklut, har hann sum heilt ungur byrjaði at spæla upp á urgu í sunnudagsskúlanum. Síðani mentist hetta bara við tíðini, til hann byrjaði at hjálpa til við at taka sær av sangkórinum, sum hann nú hevur verið leiðari av í umleið fýrati ár. Í øll hesi mongu ár hevur hann verið fastur urguspælari í Betesda.

Aftanfyri ein úrmæling stendur altíð ein góð kona. Hann fann Betty úti á Toftum, meðan hann arbeiddi í eini fyritøku í Runavík. Hon er úr góðum bergi brotin og hevur verið manni sínum ein dyggur stuðul ígjøgnum lívið.

Góði Jógvan!

– Judith og eg ynskja tær hjartaliga til lukku á 60 ára føðingardegnum og mong góð ár framyvir við Harrans ríku signing við tøkk fyri gott vinarlag í hálvthundrað ár.

**Mikkjal á Bergi**

Rúni Klein Joensen:

## Nýggjur leiðari á Shellstøðini í Gøtudali




*Mynd: Jonhard Hammer*

**12. januar 2004 tók Rúni Klein Joensen í Syðrugøtu við sum dagligur leiðari á Shellstøðini í Gøtudali**

Rúni er 29 ára gamal, sonur Oluffu, f. Pedersen, og Martin Klein Joensen í Syðrugøtu.

Hann er útbúgvin grafiskur prentari og lærdi á Estra í Gøtu.

Seinastu fýra árini hevur hann arbeitt sum sølumaður, fyrst hjá Eysturoyar Heilsølu og síðani hjá Kjølbro Heilsølu.

Hann hevur stóran áhuga fyri ítrótti, serliga fótbólti. Hann hevur verið málmaður hjá GÍ, og á fyrstu deildunum hjá bæði ÍF og NSÍ.

Eisini hevur hann spælt borðtennis og var í nøkur ár næstformaður í hondbóltsfelagnum, Tjaldur.

Rúni hevur stóran áhuga fyri kriatúrum, serliga rossum – eisini seyði og seyðahundum

Hann er giftur við Beintu, f. Hansen, av Glyvrum, tey eiga tveir synir: Martin, 4 ár, og Ábraham, ið er átta mánaðir.

Rúni tekur nýggja starvið sum eina spennandi avbjóðing. Støðin er ein sonevnd Select-støð. Hetta eru nýmótans støðir, ið leggja dent á at veita kundunum bestu tænastu og eitt stórt úrval, m.a. nýbakað breyð og pylsur. Støðin er serliga kend fyri sínar væl smakkandi hotdog, sum fólk koma langvegis frá til at keypa.

Rúni sigur, at tað skal verða ein uppliving hjá kundunum at koma inn á støðina í Gøtudali.

## VIÐMERKINGAR

# At være dansk præst på Færøerne!

**Mogens Tilsted Christensen**
*Sognepræst i Nordstrømø, Præstegården i Hvalvík*



Først og fremmest vil jeg sige tak til alle i Nordstrømø for den helt enorme kærlige og forstående modtagelse, som min kone og jeg har oplevet, siden vi kom herop i juli 2003. Det har varmet i vore - ind imellem forblæste og forfrosne - hjerter. Jeg har nu været præst på Færøerne i et halvt år.

Det er blevet til 19 barnedåb, 1 bryllup, 6 begravelser og 39 gudstjenester, 4 plejehjemsgudstjenester foruden flere husbesøg rundt om i sognene, 2 undervisningsseminarer, åbninger af 5 missionbedeuger, 3 foredrag, 2 officielle juletræstændinger samt en del attestudskrivninger og kontrabogføring. Det blev desværre nødvendigt for mig at sige nej til 2 af møder i efteråret, hvor jeg stod alene med hele området i et par måneder på grund af travlhed og opslidt stemme midt i travlheden. Ved den sidste juletræstænding, hvor det var et forrygende snevejr var stemmen også færdig, så dem af de mange fremmødte, der sad på bagerste række inde ved kaffebordet ikke kunne høre, hvad præsten sagde. Men det gik jo alligevel. Juletræslyset blev tændt, og julemanden kom i brandbil og det blev jul få uger senere.

Jeg fik en "ild-dåb" som dansk præst til Nordstrømø, hvor vi er 3 præster på et tidspunkt, hvor strejken lige var ophørt. Ferie og studieorlov bevirkede, at jeg i august måned stod alene med alle sognene med de 8 kirker og med alt, hvad der skete af kirkelige arrangementer i de sogne, der ellers er beregnet til 3 præster. Denne "ild-dåb" blev også medvirkende til, at jeg ikke havde ret mange pusterum til at forberede næste gudstjeneste eller kirkelige handling.

Da jeg så i oktober stod alene igen med 7 kirker på grund af en kollegas sygdom, så var jeg "varmet op" til opgaven.

I kirkebetjeningen er der ca. 60 navne ved alle kirkerne, der arbejder på forskellige tider, nogle hver anden måned, og andre hver 14. dag og igen nogle skifter hver 3. måned. Og disse navne skulle man så prøve at lære at huske. Det skete da også, at jeg kom til at kalde organisten i en af kirkerne for det navn, som organisten hed i en anden kirke en enkelt gang. En klokker, der hedder Tummas er blevet kaldt Petur, som hans bror hedder. Broderen er også klokker men i andre måneder. Og sådan har der været lidt at holde styr på i de forskellige kirker, der ikke helt har samme skikke. Det skal forstås således, at man nogle steder synger trosbekendelsen og andre steder synger den apostolske velsignelser, men præsten læser dem andre steder igen. Det skal lige ind på lystavlen, og det kommer det ikke fra den ene dag til den anden.

Men alligevel. Jeg har mødt en 4-500 mennesker personligt, og jeg kan vel huske navnene på de 100 nu. Men alle ansigterne står lysende klar fra første gang. Men giv præsten lidt tid til at få alle disse mange færøske navne sat fast inde i præstens hoved.

Der kommer jo hele tiden nye navne til. Og den "ungdommelige" præst bliver altså 60 år næste gang.

Men jeg har været meget glad og taknemmelig for den modtagelse, jeg har mødt. Og jeg er jo gammel nok til at vide, at ingen kan blive venner med alle.

Derfor takker vi de både de flere hundrede, der har støttet både mig og min hustru, når vi ikke altid har forstået sproget - og kollegerne, der har været med til, at det er lykkedes for den nye præst

En kolossal opbakning, som vi slet ikke havde forventet.

Som tidligere forretningsmand kan jeg ikke lade være med at tælle "utilfredse kunder" på fingrene.

Det er nemt gjort, der var kun 3, der har brokket sig. Men der bor jo 3700 i sognene. Og af dem har over 100 henvendt sig personligt, pr. mail eller pr telefon for at sige tak og erklære tilfredshed med, at Nordstrømø endelig fik en ordentlig præst. For den sidste præst, de havde var de i hvert fald ikke tilfredse med, siger de.

Min kone og jeg længes nu efter at komme til Danmark for at besøge vore 3 børn og 3 børnebørn, 5 søskende og mange venner. Og der er jo heldigvis noget, der hedder ferie og studieorlov også for den nye præst.

Der kærligste hilsner og tak for den kolossale store opbakning til præsten og hans kone.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Bergur og Bogi 50 ár



*Tvíburðarnir Bergur og Bogi Godtfred*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 28. januar fóru tvíburðarnir Bergur og Bogi Godtfred um tey hálvt hundrað. Teir eru báðir kendir frá fjølmiðla- og samskiftisheiminum.

Teir eru ættaðir úr Vági. Foreldrini eru Mia og Andrew Godtfred. Børnini hjá teimum eru Andrew, sum búði í Havnini og andaðist í 1999, Gunnvør, sum býr í Næstved og so Bergur og Bogi. Eftir realskúlan arbeiddu teir m.a. á skrivstovu í Keypmannahavn, og fyrst í sjeyti árunum fluttu foreldrini og tvíburðarnir til Havnar og búsettust í Jóannes Paturssonargøtu.

Bergur og Bogi fóru í Hoydalar at ganga í studentaskúla í 1972. Bogi leyk samfelagsligt/málsligt studentsprógv í Hoydølum í 1975. Ynskið hjá Bergi var at ganga á málsligu/musisku greinina. Sovorðið bar ikki til í Føroyum fyri tredivu árum síðani. Tí flutti Bergur eftir fyrsta árið í Hoydølum til Danmarkar, har hann í 1975 leyk studentsprógv frá Birkerød Statsskole.

Longu meðan hann gekk í Hoydølum hevði Bogi hug at fáaast við journalistik. Tað kom til sjóndar við, at hann hjálpti til á Tíðindablaðnum, sum Árni Absalonsen og Finnbogi Ísakson góvu út. Við studentspróvnum í hondini fór Bogi beina leið til Århus, har hann í 1980 leyk prógv frá Journalistháskúlanum. Meðan hann lærdi og eitt sindur aftaná arbeiddi hann sum freelance journalistur hjá DR TV, har hann eitt nú saman við Preben Heide, sum var kendur í Føroyum, var á Landet Rundt redaktiónini, sum tað tá kallaðist.

Fyrst í áttati árunum fór Bogi at arbeiða í Útvarpi Føroya, har hann var við til at leggja lunnar undir nýggjar aktuellar sendingar. Seinni flutti Bogi í Sjónvarp Føroya, har hann framvegis er millum teir hollastu tíðindamenninar.

Bogi er giftur við Ásu Isaksen, sum er ættað úr Klaksvík. Hon er yngsta barnið hjá Ester og Jens Sofusi Isaksen.

Bergur tók læraraprógv frá Tønder Semenarium í 1979. 1978–/1979 var hann lærari á Tinglev Kommunale Ungdoms-– og Musikskole, frá 1979 í Frederiksværk Folke–- og Ungdomsskole og eitt skifti eisini í musikkskúlanum–. Hann las sálarfrøði á DLH frá 1985-–1990. Skúlaárið 1993–/94 var Bergur lærari á Viðareiði, og síðani í 1994 hevur hann arbeitt á Adventistaskúlanum, á Handilsskúlanum og Tekniska Skúla í Havn. Bergur hevur skipað fyri hópum av skeiðum í eitt nú leiðslu og samskifti.

Bergur er giftur við Turið Dam. Hon er yngsta barnið hjá Kitty og Hans Hilmari Dam í Havn.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Dagurin

**29. januar. Valerius.** Var síðst í triðju øld biskupur í Trier í Týsklandi.

# Kjeld Thomsen

**f. 22. november 1938**
**d. 26. januar 2004**



Mánamorgunin 26. januar andaðist Kjeld Thomsen í Havn, 65 ára gamal.

Kjeld hevði sín seinasta arbeiðsdag sum telgrafistur 31. desember 2003 og skuldi nú til njóta tilveruna sum pensionistur, tá hann brádliga gjørdist álvarsliga súkur.

Kjeld var sonur, Elisabeth, f. Joensen, úr Havn, og Edvin Thomsen, ættaður úr Nólsoy.

Hann var føddur á Amager 22. november 1938. Foreldrini búðu í Danmark tá. Pápin sigldi við donskum skipi. Í apríl 1939 fluttu tey til Føroyar.

Eftir at hava gingið í barnaskúla og realskúla fór Kjeld í læru í Sjóvinnubankanum í 1955, og í 1958 fór hann til Danmarkar, har hann tók telegrafistprógv í 1959.

Eftir tað sigldi hann sum telegrafistur við donskum farmaskipum í umleið tvey ár. Í 1961 kom hann heim aftur og fór sum telegrafistur við trolaranum Kallsevni ein ísfiskatúr undir Íslandi.

Í 1962 fór Kjeld til Grønlands, hann fekk starv á Prins Christians Sund veður- og radiostøðini. Har arbeiddi hann so til 1965, tá hann fekk starv á telestøðini Godthåb Radio í Nuuk. Hann var við til at stovna føroyingafelagið í Nuuk og sat í nevndini har í nógv ár.

Í 1974 flutti familjan heim aftur til Føroya at búgva, og fyrstu tíðina arbeiddi Kjeld sum fotosetari á prentsmiðjuni hjá Sosialinum í Sjúrðargøtu. Hann var eisini fyritaksstjóri á blaðnum eitt skifti.

1. februar 1976 varð Kjeld settur í starv sum telegrafistur á Telegrafstøðini hjá "Det Store Nordiske Telegrafselskab" við Tinghúsvegin í Havn. Seinni yvirtók Telefonverkið støðina, sum nú hoyrir undir Føroya Tele.

Kjeld var eisini verið virkin í tónleikalívinum í Havnini, har hann hevur spælt trompet og kornet. Eisini hevur hann telvað nógv og er limur í Havnar Telvingarfelag.

Hann giftist í Grønlandi í 1965 við Poulu, f. Højgaard, av Toftum, tey fingu børnini Bjarka og Maluna, og ommu- og abbabørnini Sáru og Ragnar.

Kunngjørt verður at okkara elskaða mamma, kona, dóttir og systir

**Elin Andersen**
Ålborg

ættað av Argjum, andaðist mánadagin 26. januar 39 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Dall kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Metta**

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Petra Ingigarð Sørensen**
fødd Petersen, Tórshavn

andaðist á Lágargarði fríggjadagin 23. januar, 76 ára gomul.

Kistan fer frá Lágargarði hóskvøldið kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Amandus**

Tey ið vilja minnast Ingigarð við blómum ella kransi kunnu ístaðin lata Lágargarði eina gávu.